

*Janus á Húsagarð hevur stóra listaframsýning í Smiðjuni, og hann sýnir fram m.a. tekningrnar í bókini Ferðin hjá Mosalisu*

*Mynd: Jens Kristian*

# Janus teknar glaðar myndir

**LIST** Í dag letur Janus á Húsagarði upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík í Havn. Á framsýningini eru m.a. tekningar hansara í bókini Ferðin hjá Mosalisu, sum kemur út nú

Randi Jacobsen

Ein sera sjáldsom listaframsýning letur upp í Smiðjuni í Lítluvík í dag klokkan 16.

Listamaðurin er Janus á Húsagarði.

Hann hevur innrættað smiðjuna soleiis, at á niðaru hæddini eru tekningar, sum venda sær til børn og barnsligar sálir. Á loftinum eru tekningar meira til tey vaksnu.

Barnsligu tekningarnar eru tær, sum hann hevur prýtt nýggju bók sína Ferðin hjá Mosalinu við.

Hetta eru fittar litríkar tekningar, sum útstrála lívsgleði.

– Eg vil hava tað so, at tá fólk fara út hiðani, skulu tey fara við einum smíli, sigur Janus á Húsagarði.

Ferðin hjá Mosalinu er onnur bókin hjá Janusi á Húsagarði. Hin fyrra æt Mossamollis og var um ein trølladrong, sum ferðaðist úr Mykinesi eystur til Slættaratind.

Henda bókin er um trøllagentuna Mosalisu, sum býr í Beinsvørði, og í bókini ferðast hon runt í Suðuroynni.

### Eingin tekstur

Tað sermekrta við bókunum hjá Janusi á Húsagarði er, at søgurnar eru bara myndir. Eingin tekstur. Tað merkir, at tann, sum sigur søguna, má brúka sítt hugflog og vera fullkomiliga til staðar, meðan fortalt verður. Børn kunnu eisini sjálv gera søgur út frá tekningunum. Nógvir møguleikar eru at siga børnunum út frá myndunum um landalæru, blómur, djór og annað.

Janus á Húsagarði hevur teknað, síðan hann var smádrongur.

– Eg eri eitt sindur orðblindur, og tá ið eg gekk í skúla, sat eg bara pinnastillur og teknaði, órógvaði ongan, sigur Janus á Húsagarði.

Orðblindni hansara er eisini ein orsøkin til, at hann ger søgur við ongum teksti, sigur hann.

Ferðin hjá Mosalisu er komin út í bókaklubbanum, og nú kemur hon í bókhandlarnar.

Janus á Húsagarði hevur í ár fyri aðru ferð teknað eina ólavsøkuplakat. Hetta er esiini ein stuttlig og litrík tekning við nógvum detaljum av ymsum av tí, sum hendir á ólavsøku.

Ymiskar aðrar plakatir hevur hann eisini gjørt til hesa framsýningina.

Framsýningin er opin í dag frá klokkan 16 til 19, og leygardagin til týsdagin frá kl. 10 til 20.

randi@sosialurin.fo

# Rudda fyri Dannebrog

**DROTNINGARVITJAN** Bátar verður helst noyddir at fara útfrá, tá ið kongsskipið Danneborg í dag og aftur í næstu viku skal liggja at byggju í Sørvági

Randi Jacobsen

Í morgun klokkan 10 kom Dannebrog til Sørvágs og verður liggjandi har til leygarkvøldið.

Nógvar fyrireikingar hava verið at gjørt í Sørvágs havn upp undir vitjanina. Havnarøkið er hampað og ruddað.

Avrátt var, at Danneborg skuldi liggja niðan fyri landingarmiðstøðina, og tað hevði við sær, at størri skip í dag ikki kundu koma inn. Útróðrarfiskur frá teimum smáu bátunum sleppur inn gjøgnum eina ovari hurð, sigur Erik Davidsen, umsjónarmaður hjá kommunu við ábyrgd av Sørvágs havn.

Í gjár lógu tríggir trolarar við bryggju, og onkrir teirra noyddust at fara útfrá, serliga um verjuskipið eisini skuldi liggja har.

Gjøgnum Færøernes Kommando kom ynski um at fáa hvítar boyur at hanga niður við brygguni í staðin fyri svørtu dekkini fyri ikki at dálka kongsskipið, men tað segði kommunan nei til. Svørtu fríholtini verða hangandi, og so verða vanligar boyur koyrdar inn o.u. 4. hvørt dekk.

Danneborg verður aftur í Sørvági 1. og 2. juli, tá ið skipið fer úr Føroyum aftur.

*Dannebrog kom í morgun á Sørvág*

*Mynd: Andrea Reynstind*

